| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**25. oktober 2007** | Blað nr.:<br>**7179** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **25. oktober 2007**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 159/07-165/07**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir
Elin Lindenskov
Katrin Dahl Jakobsen
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Heri Olsen
Edvard Joensen

J. nr. 2004002360–7 SG

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 17.30:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagskránna.**

**159/07** **2007-2941**

**Ársfíggjarætlan 2008 fyri Tórshavnar havn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
**Havnarnevndin 1. oktober 2007:**
**1. viðgerð.**
Samtykt fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum javnvigar við kr. 73.720.000,- og at senda hana til býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24.oktober 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen taka støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Einmælt samtykt.

**160/07** **2006-2955**

**Uppskot til ársfíggjarætlan 2008 hjá Tórshavnar kommunu.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býráðið hevur tann 27. sept. 2007, sambært kommunustýrisskipanini, framlagt karm til ársfíggjarætlan fyri 2008, ið javnvigar við tkr. 742 mió. kr.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2008, sum faknevndirnar hava viðgjørt.

**1. viðgerð:**

**Útreiðslur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 01 | Miðfyrisitingin | kr. | 23.849.000 |
| - | 02 | Trivnaðarfyrisitingin | - | 9.137.000 |
| - | 03 | Tekniska fyrisitingin | - | 17.937.000 |
| - | 04 | Kt-deildin | - | 6.084.000 |
| | | **Fyrisiting íalt** | **kr.** | **57.007.000** |
| | | | | |
| Konto | 11 | Vegir, gøtur, kloakkir o.a. | kr. | 18.997.000 |
| - | 12 | Umhvørvismál | - | 1.850.000 |
| - | 14 | Vatnveiting og gøtuljós | - | 13.540.000 |
| - | 15 | Renovatión | - | 19.237.000 |
| - | 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | - | 21.230.000 |
| - | 18 | Bussleiðin | - | 15.857.000 |
| - | 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | - | 9.709.000 |
| - | 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | - | 12.887.000 |
| | | **Tekniska veitingar íalt** | **kr.** | **113.307.000** |
| | | | | |
| Konto | 20 | Skúlin í Hesti | kr. | 50.000 |
| | 21 | Nólsoyar skúli | - | 526.000 |
| | 22 | Velbastaðar skúli | - | 670.000 |
| | 23 | Kaldbaks skúli | - | 403.000 |
| | 24 | Kollafjarðar skúli | - | 2.673.000 |
| - | 25 | Tórshavnar kommunuskúli | - | 4.486.000 |
| - | 26 | Venjingarskúlin | - | 3.577.000 |
| - | 27 | Eysturskúlin | - | 4.189.000 |
| - | 28 | Sankta Frans skúli | - | 3.017.000 |
| - | 29 | Hoyvíkar skúli | - | 3.694.000 |
| - | 30 | Argja skúli | - | 3.449.000 |
| - | 31 | Kvøld-, ungdóms- og listaskúli | - | 4.951.000 |
| - | 32 | Tórshavnar musikkskúli | - | 6.670.000 |
| - | 33 | Felags skúlamál | - | 5.275.000 |
| | | **Skúlamál íalt** | **kr.** | **45.000.000** |
| | | | | |
| Konto | 34 | Tórshavnar býarsavn | kr. | 550.000 |
| - | 35 | Býarbókasavnið | - | 6.764.000 |
| - | 36 | Svimjihøllin | - | 5.974.000 |
| - | 37 | Stadion | - | 4.030.000 |
| - | 39 | Ymsir studningar | - | 8.660.000 |
| - | 64 | Stuðul til feløg o.o. | - | 3.022.000 |
| | | **Mentan og frítíð íalt** | **kr.** | **29.000.000** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| konto | 40 | Barnavernd - eldrarøkt o.a. | kr. | 18.885.000 |
| - | 41 | Lækna- og heilsumál | - | 4.405.000 |
| - | 411 | Serflutningsskipanin | - | 380.000 |
| - | 42 | Tannlæknastovan | - | 9.535.000 |
| - | 43 | Ellis- og umlættingarheimið | - | 0 |
| - | 431 | Sambýlið í Hoydølum | - | 640.000 |
| - | 432 | Tjarnargarður | - | 0 |
| - | 433 | Heimið í Vallalíð | | 0 |
| - | 434 | Sambýlið í Kollafirði | - | 655.000 |
| - | 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | - | 0 |
| | | Sambýlið í Mattlág | - | 500.000 |
| | | Dagtilhaldið í Kollafirði | - | 0 |
| | | Dagtilhaldið í Nólsoy | - | 0 |
| | | **Almanna og heilsumál íalt** | **kr.** | **35.000.000** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| konto | 45 | Kommunala dagrøktin | kr. | 7.438.000 |
| - | 46 | Miðstovnurin í Gundadali | - | 1.387.000 |
| - | 47 | Dagstovnurin Lítliskógur | - | 4.416.000 |
| - | 48 | Býlingshúsið á Norðasta Horni | - | 2.228.000 |
| - | 49 | Býlingshúsið á Ternuryggi | - | 2.313.000 |
| - | 50 | Býlingshúsið undir Fjalli | - | 2.357.000 |
| - | 51 | Býlingshúsið millum Gilja | - | 2.390.000 |
| - | 52 | Býlingshúsið undir Brúnni | - | 2.228.000 |
| - | 53 | Býlingshúsið Vesturi á Flat | - | 2.357.000 |
| - | 54 | Býlingshúsið Inni á Gøtu | - | 2.612.000 |
| - | 560 | Dagstovnurin í Hoyvík | - | 4.004.000 |
| - | 561 | Dagstovnurin við Løgmannabreyt | - | 3.177.000 |
| - | 562 | Dagstovnurin Millum Bóla | - | 1.622.000 |
| - | 563 | Dagstovnurin við Landavegin | - | 3.039.000 |
| - | 564 | Stella Maris vøggustova | - | 2.869.000 |
| - | 565 | Dagstovnurin Sólareygað | - | 3.347.000 |
| - | 566 | Dagstovnurin í Løkjutúni | - | 2.776.000 |
| - | 567 | Barnagarðurin við Velbastaðvegin | - | 5.874.000 |
| - | 568 | Barnagarðurin á Velbastað | - | 2.902.000 |
| - | 569 | Dagstovnurin Látrið | - | 1.476.000 |
| - | 572 | FTS í Hornabø | - | 1.408.000 |
| - | 573 | FTS Smílibýlið | - | 1.063.000 |
| - | 574 | FTS í Stoffalág 60 | - | 1.111.000 |
| - | 575 | FTS í Badmintonhøllini | - | 889.000 |
| - | 579 | FTS í Hoyvík | - | 3.211.000 |
| - | 58 | Dagstovnurin í Øksnagerði | - | 2.955.000 |
| - | 583 | Dagstovnurin Flatnagarður | - | 937.000 |
| - | 584 | Býlingshúsið í Maritugøtu | - | 2.271.000 |
| - | 585 | Dagstovnurin Kurl@ | - | 1.657.000 |
| - | 587 | Dagstovnurin við Botnánna | - | 1.362.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| - | 589 | Dagstovnurin á Hamrinum | - | 3.347.000 |
| - | 59 | Sjálvsognarstovnar o.a. | - | 17.643.000 |
| | | Barna- og ungdómsdeildin | - | 36.334.000 |
| | | **Barnaansing íalt** | **kr.** | **135.000.000** |
| Konto | 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | kr. | 9.135.000 |
| - | 81 | Sethús kommununnar | - | 0 |
| - | 82 | Umsiting av bygningum | - | 41.000.000 |
| | 63 | Útveganir | - | 4.000.000 |
| | | Nýútvegan av amboðum | - | 3.500.000 |
| | 68 | Útskiftan av amboðum | - | 6.500.000 |
| | | Summararbeiði hjá skúlaungdómi- | - | 2.000.000 |
| | | **Aðrar útreiðslur íalt** | **kr.** | **66.135.000** |
| **Konto** | **66** | **Reguleringskonto** | **kr.** | **3.000.000** |
| | | **Rakstararútreiðslur íalt** | **kr.** | **483.449.000** |
| Konto | 90 | Íløgur | kr. | 253.000.000 |
| | | Smábátahavn | - | 5.000.000 |
| | | **Rakstur og íløgur íalt** | **kr.** | **741.449.000** |
| Konto | 61 | Rentuútreiðslur | kr. | 1.000.000 |
| - | 62 | Avdráttir av lánum | - | 0 |
| - | 67 | Tórshavnar Havn | - | 0 |
| | **Lánsgjøld og grunnar** | | **kr.** | **1.000.000** |
| | | **Útreiðslur íalt** | **kr.** | **742.449.000** |

**<u>Inntøkur</u>:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 80 | Rentuinntøkur | kr. | 4.000.000 |
| - | 83 | Inntøkur av traðum og økjum | - | 3.000.000 |
| - | 89 | Skattainntøka | - | 583.000.000 |
| | | At fíggja við tøkum peningi/lántøku | - | 152.449.000 |
| | | **Inntøkur íalt** | **kr.** | **742.449.000** |

**Fíggjarnevndin 24.oktober 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen taka støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Greiddu ikki atkvøðu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Minnilutin, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, boðaði frá, at hann tekur støðu á seinni fundi, og at hann vil koma við einum broytingaruppskoti til 2. viðgerð.

**161/07** **<u>2007-3169</u>**

**<u>Makaskifti í sambandi við staðseting av gongubrúgv frá Karlamagnusarbreyt til Stórutjørn yvir um Sambindingarvegin.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við arbeiðið uppá sambindingarvegin, mælir umsitingin og byggileiðslan til, at fyrireikingarnar til festi av ætlaðu gongubrúnna tvørtur um sambindingarvegin í Hoyvíkshaganum frá Karlamagnusarbreyt til Stórutjørn, verður gjørt í sambandi við vegagerðina. Somuleiðis verður mælt til, at gongurampa frá gongubreytunum báðu megin á sambindingarvegnum upp til gongubrúnna, verða gjørdar í sambandi við vegagerðina. Hetta er fyri at sleppa undan at koma afturumaftur at grava upp seinni, við tí órógvi tað eisini vil koma at hava fyri ferðsluna.

Neyðugt er í hesum sambandi við eini nágreinligari staðseting av brúnni.

Umsitingin metir tað av stórum týdningi fyri heildina viðv. sambandinum millum Karlamagnusarbreyt og Stórutjørn, at brúgvin gerst eitt sjónligt vartekin í økinum, og at brúgvin verður staðsett í eini beinleiðis leingjan av miðlinjuni frá Karlamagnusarbreyt.

Hetta viðførir, at neyðugt verður at flyta ein sokkul í samanbygdu húsunum á Heiðunum. Planeringsarbeiðið v.m. er frammanundan gjørt á staðnum. Eykaarbeiðið kemur tí at snúgva seg um at stoypa nýggjan sokkul til 1 hús og tær broytingar av leiðingum til og frá húsinum, sum hetta viðførir.

Mælt verður til, at hetta verður loyst sum eitt makaskifti millum felagsøkið matr. nr. 135pp og matr. nr. 135os soleiðis, at matr. nr. 135os verður flutt uppat matr. nr. 135ot, og at økið, har matr. nr. 135os nú er, í staðin verður lagt afturat felagsøkinum, matr. nr.

135pp.
**Fíggjarlig viðurskifti.**
Broytingin av sokklinum í sambandi við omanfyri nevnda makaskifti væntast at viðføra eina útreiðslu á kr. 150.000,-.

Mett verður hinvegin, at arbeiðið uppá lendisfesti til gongubrúgv og gongurampa frá gongubreytunum báðu megin á sambindingarvegnum upp til gongubrúnna kunnu gerast innan fyri verandi fíggjarkarm til vegagerðina av sambindingarvegnum, og verður tí ikki biðið um serstaka játtan til hesi arbeiði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at fremja makaskifti, treytað av semju við eigaran, og at brúgvin verður staðsett út frá hesum fortreytum. Somuleiðis verður mælt til, at gongurampur og lendisfesti verða gjørd sum partur av arbeiðinum upp á sambindingarvegin. Og at enda verður mælt til at játta kr. 150.000 afturat til prosjektið at gera gongubrúgv, av íløgum fyri 2007, til rindan av gerð av nýggjum sokkli, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 22. oktober 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24.oktober 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 150.000,- av íløgum 2007.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Beate L. Samuelsen,

**162/07** **2007-3168**

**Tyrvingarplássið í Húsahaganum: Útbygging 4. byggistig**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Seinasta útbygging av tyrvingarplássinum í Húsahaganum, 3. byggistig, er um at verða

liðug, og vil henda geva tyrvingarkapasitet til uml. 1 ár.
Dálkaðu moldnøgdirnar, ið komu frá rennibreytini, hava fylt munandi meira enn mett var, og blivu hesar tilsamans uml. 13.000 m³.

Neyðugt er tí beinanvegin at fara undir 4. byggistig til tess at nøkta tørvin, til tyrvingarplássið á Glyvurnesi verður klárt. Har skulu gerast árinskanningar og aðrar tekniskar kanningar, áðrenn arbeiðið kann setast í gongd.

Hetta 4. byggistig fevnir um restina av tøka økinum innan fyri kontrolleraða tyrvingarøkið í Húsahaganum, og væntast at geva ein tyrvingarkapasitet á uml. 40-45.000 m³. Við vanligum nøgdum svarar hetta til uml. 3-4 árs kapasitet.

Ein fyribils kostnaðarmeting sigur, at 4. byggistig vil kosta millum 6,2 og 7,7 mió. kr.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Útbyggingin av 4. byggistigi er ætlað fíggjað á henda hátt:

| | |
|---|---|
| Avlopsjáttan frá 3. byggistigi | kr. 1,5 mió |
| Avsett á fíggjarætlan fyri 2008 | kr. 3,0 mió. |
| Flyting av játtan til Glyvurnes 2007 | kr. 0,5 mió |
| Mett inntøka av sølu av avlopsgróti | kr. 2,7 mió |
| Tilsamans kr. | kr. 7,7 mió |

Sølan av gróti er treytað av góðkenning og avtalu við Búnaðarstovuna um avgjald v.m. Miðað verður eftir at nýta upp til 48.000 m³ av gróti í aðrari kommunalari verkætlan, umframt at nakað av grótinum skal nýtast til arbeiðsvegir á tyrvingarplássinum.

Umsitingin greiðir nærri frá málinum á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á KB mæla til, at nevnda útbygging verður boðin út beinanvegin við innheintan av undirhondsboðum frá 2 arbeiðstakarum, og at arbeiðið verður fíggjað sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Tekniska nevnd 22. oktober 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24.oktober 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Einmælt samtykt.

**163/07** **2006-1618 (víst verður eisini til mál nr. 2007-0111)**

**Áheitan frá Advokatskrivstovuni um at banna virkseminum hjá Anders Berg í Skemminsgsøtu**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Eigarafelagið Norðasta horn hevur tann 15. mai sent fyrispurning um virksemi hjá Anders Berg í Skemmingsgøtu er í samsvari við ásetingarnar í byggisamtyktini og ásetingunum í sekytinum.

Lógir og ásetingar:
Økið liggur í umráðispartinum A1, lág bústaðarbygging.

Upplýsingar frá fyrisitingini:

Tal av bilstøðlum: 2, kravt tal av bilstøðlum er 2.

Umhvørvisárin:
Í sethúsunum og bilhúsinum eru verkstaðir, har neyðugt er at uppseta sandfang, oljuútskiljara v.m. eftir tørvi.

Fíggjarligt:
Næstu grannar hava hótt við at krevja endurgjald fyri mist virði á ognum teirra, og teir hava ætlanir um at selja hús síni vegna ampa av virkseminum á Skemmingsgøtu 23.

Skjøl:
Brøv j. nr. 2006-1618/1 til 15

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Tórshavnar kommuna áleggur Anders Berg at steðga við virksemi, vísandi til at tað ikki er í samsvari við ásetingunum í skeytinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 11. desember 2006:** Nevndin samtykti at senda málið til grannahoyringar í Skemmingsgøtu.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar, umleið helvtin av íbúgvarunum í gøtuni mæla til at virksemið verður bannað, tí hetta er til ampa fyri teir. Harumframt metir umsitingin at verandi nýtsla er í stríð við § 5 stk. 1 í almennu byggisamtyktini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 2. apríl 2007:** Nevndin samtykti at vísa málið til fíggjarnevndina at vísa manninum annað øki at virka á.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2007:** Útsett til nærri kanningar.

**Ískoyti:**
Tveir av grannunum hjá Anders Berg í Skemmingsgøtu, hava stevnt kommununi eftir at:
-at viðurkenna at virksemi hjá Anders Berg er í stríð við byggisamtyktina sum er galdandi fyri økið
-at kommunan hevur skyldu at støðga og bannað hesum virksemi
(skjal 2007-0111/1)

Sorinskrivarin hevur í fylgiskrivi til kommununa kunna um, at kommunan hevur hesar tveir møguleikarnar:

*1. Hvis De ikke er enig i påstanden i stævningen, skal De inden 14 dage fra forkyndelsen svare skriftligt. Deres svar, som kaldes svarskrift, skal indeholde Deres påstand, som skal begrundes. Sagens nummer BS 1779/2006 bedes anført.*
*2. Hvis De kan acceptere sagsøgerens påstand, behøver De ikke foretage Dem noget. De må så regne med, at der bliver afsagt dom efter sagsøgerens påstand.*

Eyðfinn Jakobsen, adv., umboðar kommununa í sakarmálinum.

Neyðugt er fyri advokatin í samband við sakarviðgerðina, at evsti politiski myndugleikin – t.e. Býráðið – tekur støðu um hvønn av omanfyristandandi møguleikum ið Sorinskrivarin vísir á, kommunan hevur í málinum.

Umsitingin hevur í tilmæli til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 11. des. 2006 og í ískoyti til fundin 2. apríl 2007 víst á, at hon metir virksemi hjá Anders Berg at verða í stríð við ávikavist ásetingarnar í skeytinum og ásetingarnar í Kap. IV, § 5 stk. 1 í almennu byggisamtyktini.

Í grein 10, litra e. í skeytinum er ásetingin soljóðandi:
*e. Húsini mugu ikki verða nýtt til annað endamál enn bústað, men tó kunnu fyri minni partar av íbúðini frávik verða gjørd, tá hetta ikki spillir dámin á økinum sum bústaðarøki, so sum til handil og onnur vinnuendamál.*

Í Kap. IV, § 5 stk. 1 í almennu byggisamtyktini.er ásetingin soljóðandi:
*§ 5, stk. 1. Loyvi er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, raðhús og ketuhús og tilíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Í samband við bústaðarøkið kann byggivaldið geva serloyvi til at byggjast kunnu handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið náttúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.*

Tað er greitt, at soleiðis sum bæði skeyti og byggisamtyktin er orða, er talan um eina meting í hvørjum einstøkum føri um, hvørt virksemi sum talan er um er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur. Harumframt er greitt ásett í bæði skeytinum, at frávik skal gevast til nýtslu av húsum til annað endamál enn bústað, umframt at tað í almennu byggisamtyktini er ásett, at serloyvi skal gevast til at byggja til

annað enn bústaðarendamál. Anders Berg hevur ikki fingið játtað frávik sambært skeytinum og heldur ikki serloyvi sambært byggisamtyktini.

Fyri at advokatur kommununar skal kunna føra sjónarmiðini hjá kommununi, sum Evsti byggimyndugleikin – t.e. býráðið – eigur tí at takað støðu til:

1. um byggivaldi metir virksemi hjá Anders Berg at verða í stríð við ásetingarnar í grein 10, litra e í skeytinum
2. um byggivaldi metir virksemi hjá Anders Berg at verða í strið við Kap. IV, § 5 stk. 1 í almennu byggisamtyktini
3. um byggivaldi metir seg hava givið frávik til verandi virksemi hjá Anders Berg, við heimild í grein 10, litra e í skeytinum
4. um byggivaldi metir seg hava givið serloyvi til verandi virksemi hjá Anders Berg, Kap. IV, § 5 stk. 1 í almennu byggisamtyktini
5. um Anders Berg skal áleggjast at støðga við verandi virksemi beinanvegin

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Tórshavnar kommuna áleggur Anders Berg at flyta virksemið úr økinum innan eina nærri ásetta tíðarfreist, vísandi til at nógv økta virksemi ikki er í samsvari við ásetingunum í grein 10, litra e í skeytinum, og kap. IV, §5, stk. 1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, eins og virksemi ikki hevur kravda umhvørvisliga góðkenning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:**

Ein meiriluti: Leivur Hansen, Katrin Dahl Jacobsen og Bjarti Mohr meta ikki, út frá fyriliggjandi upplýsingum, at talan er um nógv økt virksemi, og tekur tískil ikki undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jógvan Arge mælir til at taka undir við, vísandi til grannahoyring, at virksemi ikki er í samsvari við ásetingarnar í grein 10, litra e í skeytinum, og kap. IV, §5, stk. 1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen mælir til at kommunan saman við Anders Berg finnur annað egnað øki til virksemi hansara.

**Ískoyti:**
Sakarmálið, har tveir av grannunum hjá Anders Berg í Skemmingsgøtu, hava stevnt kommununi eftir at:
-at viðurkenna at virksemið hjá Anders Berg er í stríð við byggisamtyktina sum er galdandi fyri økið.
-at kommunan hevur skyldu at steðga og banna hesum virksemi.

er dómsviðgjørt í Føroya Rætti 28. aug. 2007, har rætturin er komin við einum "tilkendegivelse", ið gevur saksøkjarunum viðhald, og mælir rætturin til at partarnir gera eina rættarsemju, og boða frá seinast 11. sept. 2007. Annars fellur dómur í málinum. Løgfrøðingur kommununar sigur í skrivi til kommuna, at úrslitið kemur ikki óvæntað á hann, og mælir hann kommununi til at gera eina rættarsemju.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um hon vil gera eina rættarsemju við tí innihaldi, ið Føroya Rættur leggur upp til í skjali 2007-0111/15, ella um nevndin vil hava dóm í málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2007:** Nevndin samtykti at lata dóm fella í málinum.

**Ískoyti:**
Soljóðandi dómsúrskurður er gjørdur í sakarmálinum hjá íbúgvum í Skemmingsgøtu móti Tórshavnar kommunu.

*"Sagsøgte, Tórshavnar kommuna, skal anerkende, at Anders Bergs erhvervsmæssige virksomhed på Skemmingsgøta 23 ved Norðasta Horn er i strid med byggevedtægten, som er gældende for området, og at kommunen har pligt til at forbyde og standse denne virksomhed.*
*Sagsøgte skal inden 14 dage betale sagsomkostninger til sagsøgerne, Magni Johannesen og Torkil Holm Petersen, med 25.000 kr."*

Løgfrøðingur kommununar metir ikki at tað er orsøk til at kæra dómin til Landsrættin. Byggi- og býarskipanarnevndin og býráðið eiga at taka støðu til, um takast skal við dóminum ella um hann skal kærast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tikið verður við dóminum, og at Anders Berg fær boð um at støðga við virksemi sínum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober. 2007:** Nevndin samtykti at tikið verður við dóminum.

Somuleiðis samtykti nevndin at vísa málið til fíggjarnevndina at vísa manninum á annað øki at virka á.

**Fíggjarnevndin 24.oktober 2007:** Samtykt at taka við dóminum og at beina málið um vinnuøki til umsitingina og at leggja fyri fíggjarnevndina aftur.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Tikið av skrá.

164/07 **1999-0345**

**Val av limi til bygginevndina fyri Høllina á Hálsi sambært § 36 í kommunustýrislógini.**

**Býráðið 25. oktober 2007:** Vald vórðu Katrin Dahl Jakobsen og Jan Christiansen.

165/07 **2004-0558**

**Mál um 10. flokk**

Á fundi í mentamálanevndini 8. februar 2006 samtykti nevndin at heita á skúlastjórarnar í framhaldsskúlunum í Tórshavnar kommunu at velja fimm fólk í ein arbeiðsbólk at viðgera 10. flokk.

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var soleiðis orðaður:

*Arbeiðsbólkurin verður biðin at koma við uppskoti, hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga í framtíðini, og um hann skal verða skipaður í eina eind ella fleiri eindir.*

Heitt varð á arbeiðsbólkin at lata mentamálanevndini uppskotið í seinasta lagi 15. mai 2007.

**Í arbeiðsbólkin vórðu tilnevnd:**
Eyðdis Eidesgaard, formaður, umboð fyri skúlastjórarnar
Jacob Thomsen, lærari í Tórshavnar Kommunuskúla
Símun Joensen, lærari í Eysturskúlanum
Birgir Mortensen, lestrarvegleiðari í Handilsskúlanum í Havn, umboð fyri miðnámskúlarnar
Joel undir Leitinum, stjóri í Samskip, umboð fyri vinnulívið
Høgni Joensen, skrivari, umboð fyri býráðið

Álitið um 10. flokk verður framlagt á fundinum.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Høgni Joensen, skrivari í arbeiðsbólkinum, legði álitið fram.

**Niðurstøða hjá arbeiðsbólkinum**
Arbeiðsbólkurin er samdur um, at neyðugt verður at tillaga 10. flokk til nýggjar tíðir og nýggjar avbjóðingar, og at hugburðurin um 10. flokk skal broytast frá at vera endin á fólkaskúlanum til at verða byrjanin til eina útbúgving.

Í 10. flokki skulu næmingar uppliva eitt øðrvísi skúlaár, har hann/hon hevur ávirkan, setur saman og fullførir sítt skúlaár. Er virkin í einum dynamiskum ungdóms- og útbúgvingarumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað fakliga og at vera við at taka avgerðir undir felags ábyrgd, har álit og virðing eru lyklaorð.

Men arbeiðsbólkurin er ikki fullsamdur um eitt felags tilmæli. Annað tilmæli er tí frá einum meiriluta: Eyðdis Eidesgaard, Símuni Joensen, Joel undir Leitinum, Birgiri Mortensen og Høgna Joensen og hitt frá einum minniluta: Jákupi Thomsen.

Meirilutin heldur, at í Tórshavnar kommunu skulu allir 10. floks næmingar verða savnaðir í ein depil, sum skal geva teimum, ið taka av tilboðnum, eitt spennandi og fjølbroytt skúlaár, har tey koma at hitta nýggjar floksfelagar og lærarar og leggja lunnar undir framtíðarlesnað og framtíðaryrki.

10. floksdepilin skal *ikki verða partur* av einum øðrum skúla, men verður ein sjálvstøðugur skúli við egnari leiðslu og lærarum.

Neyðugt verður at seta ein skúlaleiðara og ein varaskúlaleiðara, eitt skrivstovufólk og uml. 10-12 lærarar, sum burturav undirvísa í 10. floksdeplinum. Væntast skal, at tveir lærarar eisini hava útbúgving sum lestrarvegleiðarar. Hinir lærararnir skulu í høvuðsheitum tryggja, at næmingarnir verða undirvístir í lærugreinum og breytum.

Minnilutin mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir. Onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja.

**Tilmæli frá arbeiðsbólkinum um 10. flokk**

**Meirilutatilmæli**
Eyðdis Eidesgaard, Símun Joensen, Joel undir Leitinum, Birgir Mortensen og Høgni Joensen.

**Skúlaeindin**
Meirilutin í arbeiðsbólkinum mælir til at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil frá skúlaárinum 2008/2009 við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla.

Mælt verður eisini til, at 10. floksdepilin fyribils verður í e-lonini í Eystursk\u00falanum, men við framtíðini í huga, eigur at verða miðað eftir at byggja ein nýggjan 10. floksdepil í Marknagili.

**Lærarar**
Lærarar, sum eru hugaðir at undirvísa í 10. floksdeplinum, skulu hava møguleika at søkja um farloyvi úr skúlanum, har teir eru í føstum starvi. Farloyvi skal í minsta lagi verða játtað í 2 ár.

**Skipanin**
Hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga, mælir arbeiðsbólkurin til at varðveita breytatilboðini og starvslæruna. Temalestur og brúgvasmíð skal eisini standa næmingunum í boði. Brúgvasmíð skulu verða skipað formliga.

Føroyskt, enskt og støddfrøði verða kravdar lærugreinir. Danskt, týskt, alisfrøði, evnafrøði, átrúnaður (religión), samtíð, lívfrøði og landalæra verða vallærugreinir. Hetta krevur lógarbroyting.

Tveir tímar um vikuna verða settir av til “ floksins tíma”, har næmingurin m.a. fær høvi at hitta sín kontaktlærara ella arbeiða við síni verkætlan. Kontaktlærarin hevur ábyrgd av 12-15 næmingum. Flokslæraraskipanin verður tikin av, tí næmingarnir verða undirvístir í bólkum heldur enn í flokkum.

Tað skal verða tvungin uppmøting og skylda at lata inn skrivligar uppgávur.

Næmingunum eigur at standa í boði at taka ella gera fráfaringarroynd fólkaskúlans betri, t.e. 9. flokkur, og taka víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans, t.e. 10. flokkur í føroyskum, donskum, enskum, týskum, støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði.

**Minnilutatilmæli**
Jákup Thomsen.

Minnilutin í arbeiðsbólkinum mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir.

Grundgevingin er, at tað er týdningarmikið, at næmingarnir ikki verða miðsavnaðir í eina eftir føroyskum viðurskiftum ov stóra eind, tí tá er vandi fyri, at menningin og fjølbroytnið í skipanini ikki verða tryggjað nóg væl.

Við tveimum skúlaeindum, ið ikki eru ov stórar, verður fakliga og sosiala samveran ímillum næmingar og lærarar betur tryggjað, og tískil er lærarin betur førur fyri at hjálpa tí einstaka næminginum. Víst verður eisini á, at tað er týdningarmikið fyri menningina at hava tvær eindir, sum kappast um at geva næmingunum tey bestu tilboðini.

Minnilutin mælir til, at onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og teir í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja at fara í. Annars tekur minnilutin í høvuðsheitum undir við uppskotinum, hvussu undirvísingin í framtíðini verður skipað, og at skúlaeindirnar framvegis samstarva um breytatilboðini.

**Tilmæli frá trivnaðarfyrisitingini**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá meirilutanum um at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil í e-lonini á Eysturskúlanum við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla.

**Grundgeving:**
Vísandi til álitið meta trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin, at ov fáir næmingar eru til at skipa tvær 10. flokseindir við nøktandi undirvísingartilboði.

Í álitinum verður staðfest, at tað í dag er ein stórur trupulleiki at fáa lærugreinir lisnar, tí næmingagrundarlagið er ov lítið. At skipa 10. flokkarnar í tvær eindir broytir lítið upp á hetta.

Endamálið við 10. flokki er, at næmingurin meira enn áður skal kunnu seta saman sína egnu útbúgving. Bert við einum rímiliga stórum næmingagrundarlagi kunnu skúlarnir bjóða nøktandi lærugreina- og breytartilboð.

Í skúlaárinum 2006/2007 góvust nærum ¼ av næmingunum í 10. flokki, tað svarar til tveir heilar flokkar. Hetta er dýrt fyri kommununa, fyri landið og ikki minst menniskjaliga fyri einstaka næmingin.

Skulu vit megna at broyta hugburðin til, at 10 flokkur skal verða byrjanin til eina útbúgving heldur enn endin á fólkaskúlanum, krevst nýhugsan á skúlaøkinum. Skal tað eydnast at skipa eitt kveikjandi læru- og ungdómsumhvørvi fyri næmingarnar í 10. flokki og byggja brúgvar til aðrar útbúgvingarstovnar og vinnulívið, verður neyðugt at broyta verandi skúlabygnað, soleiðis at 10. skúlaárið verður ein sjálvstøðug skúlaeind.

Býráðið hevur tikið avgerð um at skipa nýggju skúlarnar í kommununi úr 1. upp í 9. flokk. Rætt er at lata hendan leistin galda fyri allar skúlar í kommununi, og skipa eina sjálvstøðuga 10. flokseind at taka ímóti næmingum úr øllum skúlunum við tí fyri eyga, at 10. flokkur verður byrjanin til eina útbúgving.

Hølisliga letur tað seg gera at skipa 10. flokk í eina sjálvstøðuga eind í e-lonini í Eysturskúlanum. Har eru góð undirvísingarhøli, serstovur, bókasavn o.a. Fortreytir, sum gera, at møguleikar eru at skipa eitt gott og mennandi umhvørvi hjá bæði næmingum og lærarum.

Í Tórshavnar Kommunuskúla eru sum er trongir høliskarmar. Tí ber illa til at ímynda sær, at tað fer at bera til at skapa nóg góðar og spennandi umstøður til enn fleiri næmingar.

**Mentamálanevndin 23. oktober 2007:** Málið umrøtt og útsett til ein seinni fund.

**Býráðið 25. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |